

*Superveteranurin, Jens Erik Rasmussen, bjargaði 07 Vestur*
*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

# 07 Vestur einsamallir á odda

## 1. DEILD MENN Jens Erik Rasmussen staðfesti enn einaferð sítt stóra virði fyri vágamenn

Heri Simonsen

07 Vestur vann 2-1 á HB í Gundadali, og eru teir nú einsamallir á odda í næstbestu fótbóltsdeildini. Superveteranurin, Jens Erik Rasmussen legði 07 Vestur á odda 1-0, tá 35 minuttir vóru farnir. Tá 43 minuttir vóru farnir javnaði Jóhan Eivind Restorff Mouritsen fyri HB. Tá sjey minuttir vóru eftir av vanligu leiktíðini skeyt Jens Erik Rasmussen sigursmálið hjá 07 Vestur uppá brotsspark. Í yvirtíðini fekk Kim Poulsen hjá 07 Vestur beinleiðis reytt kort fyri eina eftirtakling. Bárður Mittelstein hjá HB fekk tvey gul kort, tað seinna í samband við brotssparkið hjá 07 Vestur, so bæði liðini endaðu dystin við 10 monnum.

### TB vann klassikaran

Bestu liðini hjá elsta og næstelsta fótbóltsfelagnum í Føroyum, TB og KÍ spældu leygardagin tann fyrsta av trimum klassikarum í næstbestu fótbóltsdeildini. TB vann heimadystin 2-1. Hálvleiksstøðan var 1-1. Heri K. Olsen legði KÍ á odda, tá 35 minuttir vóru farnir, men bert tveir minuttir seinni javnaði Josef Bassene fyri heimaliðið. Tá ein tími var farin skoraði Tórur Mortensen sigursmálið fyri TB. Sami Tórur Mortensen var rikin av vølli, tá 75 minuttir vóru farnir, men hetta dugdi KÍ ikki at gagnnýta.

### Fyrsti sigurin til AB

Teir næstbestu hjá AB fingu sín fyrsta sigur, og síni fyrstu stig í 1. deild. AB vann stórsigur 4-1 á Víkingi úti í Vika á Argjum. Per Gregersen legði annars Víking á odda, tá 40 minuttir vóru farnir, men beint áðrenn steðgin javnaði Fróði Stenberg fyri AB. Í seinna hálvleiki koyrdi tað, sum eftir Sandánni hjá AB. Tá 52 minuttir vóru farnir legði Tummas Justinussen AB á odda 2-1. Tá seinni hálvleikur var hálvrunnin økti Jónas Stenberg til 3-1, og løtu seinni staðfesti Fabrice sigurin.

### Sundalagsmenn fingu fult

Teir næstbestu hjá EB/Streymi vunnu 2-1 yvir NSÍ á heimavølli. Hálvleiksstøðan var javnleikur 0-0. NSÍ legði seg annars á odda 1-0, tá 51 minuttir vóru farnir við máli, sum Debes Danielsen skoraði. Fimm minuttir seinni javnaði EB/Streymur við einari sannari frísparksperlu, tá Hanus Olsen hegnisliga setti bóltin við samankomingina. Esmar Eiðisgarð skoraði sigursmálið fyri EB/Streym, tá 69 minuttir vóru farnir. Per Langgaard fekk tað reyða kortið fyri kjaftaslit, tá dysturin var liðugur.

*heris@sosialurin.fo*

## 1. DEILD MENN 4. UMFAR:

### TB - KÍ 2-1 (1-1)

0-1 Heri K. Olsen (35.)
1-1 Josef Bassene (37.)
2-1 Tórur Mortensen (60.)

*Útvísing: Tórur Mortensen, TB*

### AB - Víkingur 4-1 (1-1)

0-1 Per Gregersen (40.)
1-1 Fróði Stenberg (44.)
2-1 Tummas Justinussen (52.)
3-1 Jónas Stenberg (68.)
4-1 Fabrice (72.)

### HB - 07 Vestur 1-2 (1-1)

0-1 Jens Erik Rasmussen (35.)
1-1 Jóhan Eivind R. Mouritsen (43.)
1-2 Jens Erik Rasmussen (83. - brotsspark)

*Útvísingar: Kim Poulsen, 07 Vestur og Bárður Mittilstein, HB.*

### EB/Str. - NSÍ 2-1 (0-0)

0-1 Debes Danielsen (51.)
1-1 Hanus Olsen (56.)
2-1 Esmar Eiðisgarð (69.)

*Útvísing: Per Langgaard, NSÍ*

## Føroyska 1. Deild menn

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 07 Vestur | 4 | 3 | 1 | 0 | 6 | 3 | +3 | 10 |
| 2 | KÍ | 4 | 2 | 1 | 1 | 9 | 4 | +5 | 7 |
| 3 | Víkingur II | 4 | 2 | 1 | 1 | 10 | 8 | +2 | 7 |
| 4 | TB | 4 | 2 | 1 | 1 | 7 | 5 | +2 | 7 |
| 5 | EB/Streymur II | 4 | 2 | 1 | 1 | 5 | 5 | 0 | 7 |
| 6 | HB II | 4 | 2 | 0 | 2 | 8 | 8 | 0 | 6 |
| 7 | NSÍ II | 4 | 0 | 3 | 1 | 4 | 5 | -1 | 3 |
| 8 | AB II | 4 | 1 | 0 | 3 | 5 | 8 | -3 | 3 |
| 9 | FC Hoyvík | 3 | 0 | 1 | 2 | 3 | 5 | -2 | 1 |
| 10 | B68 II | 3 | 0 | 1 | 2 | 2 | 8 | -6 | 1 |

## Føroyska 2. Deild menn

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FC Hoyvík II | 3 | 3 | 0 | 0 | 7 | 1 | +6 | 9 |
| 2 | B36 II | 3 | 2 | 1 | 0 | 11 | 2 | +9 | 7 |
| 3 | KÍ II | 3 | 2 | 1 | 0 | 10 | 4 | +6 | 7 |
| 4 | Skála | 3 | 1 | 1 | 1 | 4 | 4 | 0 | 4 |
| 5 | FC Suðuroy II | 3 | 1 | 0 | 2 | 4 | 7 | -3 | 3 |
| 6 | ÍF II | 3 | 1 | 0 | 2 | 4 | 7 | -3 | 3 |
| 7 | TB II | 3 | 1 | 0 | 2 | 4 | 8 | -4 | 3 |
| 8 | 07 Vestur II | 2 | 0 | 2 | 0 | 3 | 3 | 0 | 2 |
| 9 | Víkingur III | 2 | 0 | 1 | 1 | 3 | 7 | -4 | 1 |
| 10 | MB | 3 | 0 | 0 | 3 | 1 | 8 | -7 | 0 |

## Føroyska 1. Deild kvinnur

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 4 | 4 | 0 | 0 | 28 | 2 | +26 | 12 |
| 2 | AB | 4 | 3 | 0 | 1 | 21 | 3 | +18 | 9 |
| 3 | Skála | 3 | 2 | 0 | 1 | 8 | 4 | +4 | 6 |
| 4 | Víkingur | 4 | 2 | 0 | 2 | 6 | 6 | 0 | 6 |
| 5 | EB/Streymur | 4 | 0 | 1 | 3 | 3 | 19 | -16 | 1 |
| 6 | MB | 5 | 0 | 1 | 4 | 3 | 35 | -32 | 1 |

## Enska Barclays Premier League

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | MÁL | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Chelsea | 36 | 25 | 5 | 6 | 93-32 | 80 |
| 2 | Manchester United | 36 | 25 | 4 | 7 | 81-28 | 79 |
| 3 | Arsenal | 36 | 22 | 6 | 8 | 78-39 | 72 |
| 4 | Tottenham | 35 | 19 | 7 | 9 | 63-37 | 64 |
| 5 | Aston Villa | 36 | 17 | 13 | 6 | 51-35 | 64 |
| 6 | Manchester City | 35 | 17 | 12 | 6 | 69-42 | 63 |
| 7 | Liverpool | 36 | 18 | 8 | 10 | 61-33 | 62 |
| 8 | Everton | 36 | 15 | 12 | 9 | 59-49 | 57 |
| 9 | Birmingham | 36 | 12 | 11 | 13 | 35-44 | 47 |
| 10 | Sunderland | 36 | 11 | 11 | 14 | 47-53 | 44 |
| 11 | Blackburn | 36 | 11 | 11 | 14 | 38-54 | 44 |
| 12 | Fulham | 35 | 11 | 10 | 14 | 36-39 | 43 |
| 13 | Stoke | 35 | 10 | 13 | 12 | 33-44 | 43 |
| 14 | Bolton | 36 | 9 | 9 | 18 | 40-65 | 36 |
| 15 | Wolverhampton | 36 | 8 | 11 | 17 | 29-52 | 35 |
| 16 | Wigan | 36 | 9 | 8 | 19 | 35-69 | 35 |
| 17 | West Ham | 36 | 8 | 10 | 18 | 44-62 | 34 |
| 18 | Hull | 36 | 6 | 10 | 20 | 32-73 | 28 |
| 19 | Burnley | 36 | 7 | 6 | 23 | 37-78 | 27 |
| 20 | Portsmouth | 36 | 6 | 7 | 23 | 31-64 | 16 |

**Føroyskir leikarir:** *Gunnar Nielsen (Manchester City)*

## Danska SAS-Ligaen

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | MÁL | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FC København | 29 | 18 | 5 | 6 | 52-19 | 59 |
| 2 | OB | 29 | 15 | 8 | 6 | 40-28 | 53 |
| 3 | AaB | 29 | 12 | 8 | 9 | 32-23 | 44 |
| 4 | FC Midtjylland | 28 | 13 | 5 | 10 | 38-38 | 44 |
| 5 | Brøndby IF | 29 | 12 | 7 | 10 | 48-45 | 43 |
| 6 | Esbjerg fB | 29 | 11 | 10 | 8 | 39-38 | 43 |
| 7 | FC Nordsjælland | 29 | 12 | 5 | 12 | 35-34 | 41 |
| 8 | Silkeborg | 29 | 11 | 7 | 11 | 44-40 | 40 |
| 9 | SønderjyskE | 29 | 8 | 8 | 13 | 26-33 | 32 |
| 10 | AGF | 29 | 8 | 8 | 13 | 30-41 | 32 |
| 11 | Randers FC | 28 | 7 | 9 | 12 | 27-37 | 30 |
| 12 | HB Køge | 29 | 3 | 6 | 20 | 28-63 | 15 |

**Føroyskir leikarir:** *Christian Lamhauge Holst (Silkeborg)*